# Burturi á ólavsøku



### *Mortan Jakobsen, námsfrøðingur í Keypmannahavn:*

# Ólavsøkan verður allarhelst hildin á Bryggjuni

- Nú eru sum fráliður mong Harrans ár farin síðani at eg var á Ólavsøku í Tórshavn. Minnist meg rætt luttók eg seinastu ferð í hátíðarhaldinum einaferð í 80-árunum. Tað vil so vera, at tess eldri tú gerst, tess minni er áhugin - soleiðis eri eg í hvussu so er háttaður, og eg ivist ikki í, at mong eru tey, ið eru samd við mær hvat hesum viðvíkur.

Soleiðis sigur føroyski útisetin Mortan Jakobsen, ið sum fráliður er vorðin 57 ára gamal, og sum seinastu mongu árini hevur verið búsitandi saman við familjuni á Christianshavn á Amager í keypmannahavn.

- Sum skilst er rættiliga stórur munur á Ólavsøkuni nú í mun til fyrr, men enn er kappróðurin og fótbólturin í hásetri, og tað er hóast alt sera jaligt. Seinast eg var á Ólavsøku var fullkomið spiritusforboð í Føroyum, og havi eg ongantíð í lívi mínum skoðað so nógv full fólk samstundis. Mær er sagt, at síðani Rúsan varð sett á stovn og mongu barrirnar hava stungið seg upp á hvørjum herðashorni, er hesin óskikkur meira ella minni horvin, og tað er gott, sigur Mortan.

Enn sum áður elskar hann føroyskan mat, sum t.d. knettir, ræstan fisk og seyðarhøvd – og síðst men ikki minst, sosiala samveru við føroyingar. Tí hevur hann seinastu 3 árini luttikið í Ólavsøkuhaldinum á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn.

- Eg havi familju bæði á Fjóni og her í keypmannahavn, og tað er í ferð við at verða ein fastur táttur á hvørjum ári, at vit hittast á Bryggjuni til Ólavsøkuhugna. Her fæst breyð við føroyskum viðskera, føroyskur dansur og góður tónleikur. Eg má viðganga, at eg eri sera fegin um tiltakið, tí hetta hevur higartil givið mær nógvar góðar løtur saman við landsmonnum mínum, sigur Mortan, sum er føddur og uppvaksin í Keypmannahavn, men hevði føroysk foreldur.

*Símun úr Konoy*













